

# Fótbólts-feðgar við Løkin á hvør sínum liði

**FÓTBÓLTUR** Pápin hevði sína fótbóltsuppaling í ÍF. Synirnir høvdu sína fótbóltsuppaling í NSÍ. Pápin hevur roynt seg sum spælara og venjara í NSÍ. Nú venur pápin ÍF, og yngri sonurin hevur havt heimavøll í Fuglafirði seinasta árið, meðan eldri sonurin hevur havt heimavøll við Løkin

Heri Simonsen

Tætt við Toftavatn standa eini stór sethús. Rundan um stóru sethúsini eru nógv trø, sum gera økið til eitt serstakliga hugnaligt umhvørvið hjá búfólkum, starvsfólkum og vitjandi. Sethúsið eru nevnliga í dag eitt eldrasambýli, men upprunaliga vóru húsini barndómsheimið hjá konu Abraham – mammu Boga og Karl – sum eitur Kára Løkin. Løkin rennur framvið barndómsheiminum hjá Káru, og henda áin rennur eisini framvið fótbóltsvøllinum í Runavík, har teir sum bera eftirnavnið Løkin eiga nógv spor. Aftaná lokið kappingarár stendur Bogi við einum bronsumerki um hálsin, sum hann hevur vunnið við NSÍ, meðan Karl og Abraham hava verið við til at tryggja ÍF fyrstu europeisku luttøkuna í søgu felagsins við einum fjórða plássi í landskappingini, sum varð tryggjað í allarevstu løtu.

## Karl er nøgdur

Karl Løkin er nøgdur við tað fyrsta kappingarárið í tí reyðu ÍF-troyggjuni.

– Vit komu í steypafinaluna, og vit gjørdust nummar fýra, og ÍF sleppur út í Europa fyri fyrstu ferð í søguni. Tá haldi eg, at ein kann verða nøgdur, slær Karl fast.

Karl er glaður fyri, at hann sum fótbóltsspælari kann sleppa at royna seg í Europa League komandi ár. Hann vónar tó, at ÍF sleppur undan at fara til tey fjarskotnu londini í Eystur-Europa. Karl dylir ikki fyri, at hann vónar, at ÍF fær eitt mótstøðulið úr Danmark, ella eitt lið úr einum av okkara grannalondum. Karl hevur eisini sett sær nøkur mál fyri hesar dystirnar.

– Talan er um eitt hægri støði, har ein kann vísa umheiminum, hvør dugur er í tær.

## Nógvir hálvir fuglfirðingar

Heimafturkomin aftaná eitt fótbóltsuppihald í Randers helt Karl, at tað kundi verið stuttligt at royna fótbóltseydnuna í Fuglafirði, har pápin var venjari. Karl eigur eisini nógv spor á fótbóltsvøllinum í Fuglafirði.

– Sum yngri var eg ofta á vitjan hjá ommu í Fuglafirði, og ofta bleiv tað til, at eg var uppi á fótbóltsvøllinum allan dagin, so tað er púra víst, at eg havi eitt tilknýtið til ÍF, sigur hann.

Karl letur heldur ongan iva verða um, at hann eisini hevur røturnar, sum skulu til, fyri at gerast ein integreraður partur av ÍF. Hann og Ennigarð-brøðurnir, Andy Olsen og Øssur Dalbúð hava allar tað til felags, at teir eru hálvir fuglfirðingar, og hava tí eitt stórt tilknýti til Fuglafjørð. Og tí heldur Karl ikki, at fólk kunnu tosa um »fremmandar spælarar«!

## Eitt umskiftiligt kappingarár

Bogi Løkin hevur havt eitt rættiliga umskiftiligt ár sum fótbóltsspælari, har hann fyrra partin av árinum royndi seg í Frem úti í Valby í Keypmannahavn. Gamla arbeiðarafelagið, sum er stovnað í 1886 fór illa, bæði ítróttarliga og fíggjarliga.

Spurdur um hvussu hann hóast alt er nøgdur við tað persónliga fótbóltsárið, svarar Bogi.

– Tað hevur sjálvandi verið eitt sindur upp og niður, men tað hevur kortini verið ein menning í gongdini, sum árið er gingið, staðfestir Bogi.

Hann iðrar seg eitt sindur um, at NSÍ ikki rakk upp á ovasta tindin, aftaná góðu gongdina, liðið hevði fyrstu tveir triðingarnar av kappingini. Bogi vil ikki seta beinleiðis orð á niðurtúrin NSÍ fekk, sum elvdi til, at HB og EB/Streymur yvirháláðu NSÍ á stigatalvuni.

– Tað er alt møguligt, sum ger seg galdandi. Vit komu í eina støðu, har vit vóru liðið, sum hinir eltu, og tað legði eitt eyka trýst á okkum. Til tíðir spældu vit ikki nóg væl, men tað vóru eisini dystir, har marginalarnir ikki vóru við okkum. Tað vóru dystir, har vit vóru tað betra liðið, og so fór tað kortini ikki okkara veg í hesum dystunum. Tað vísir seg at byrjar tað fyrst at ganga ímóti, so er tað sera torført at broyta gongdina, greiðir Bogi frá.

## Lærdi nógv í Danmark

Sjálvt um talan var um eina harða tíð niðri í Danmark, so kennir Bogi, at hann hevur lært nógv av fótbóltsuppihaldinum í Frem.

– Eg tori at siga, at tað var vert at royna nakað annað, har ein kann menna seg. Men ein lærir skjótt, at tingini eru als ikki, sum heima í Føroyum, har liðfelagarnir eru vinmenn. Sosialt kann tað ikki samanberast á nakran hátt.